## Færri ferðafólk á Kýpros

Fleiri av teimum væl umtóktu ferðavinnuplássunum kæra seg um, at tey hava færri ferðafólk í ár enn undanfarin ár, og soleiðis er eisini á oynni Kýpros. Ferðavinnan har sigur, at fimm teir fyrstu mánaðirnar í ár vóru ferðafólkini níggju prosent færri enn somu mánaðir í fjør. Tað eru serliga bretar, sum sita við hús ella hava valt annað ferðamál. Ferðavinnan á Kýpros sigur, at til j. juni komu 622.000 ferðafólk til oynna ímóti 682.000 í sama tíðarskeiði í fjør. Tað var serliga mai, sum sveik, tí tann mánaðin vóru ferðafólkini 9,2 prosent færri enn í sama mánaði í 2008. Ferðavinnan hevur stóran búskaparligan týdning fyri Kýpros, tí umleið 12 prosent av landsins bruttotjóðarframleiðslu stavar frá ferðavinnuni, skrivar Reuters.

## ST ávarar um veðurlagsvanlukkur

Eydnast tað ikki at tálma avleiðingunum av veðurlagsbroytingunum, kann tað fáa ovurstórar avleiðingar fyri fleiri milliónir fólk í heimsins størstu býum, sigur ST í einari nýggjari ávaring. John Holmes, varaaðalskrivari, segði í einari røðu í gjár, at tann veksandi hitin á jørðini fer at elva til fleiri vanlukkur og verri vanlukkur. Hann segði, at 90 prosent av náttúruvanlukkunum kring heimin í fjør vóru ávirkaðar av veðurlagsbroytingum, og at skaðarnir fóru langt upp um 1.000 milliardir krónur. John Holmes nevndi, at serliga teir størstu býirnir í heiminum eru komandi vandaøki, tí teir eru úti við strondina.

# Skiparar mynstra av

**Bæði Pauli Larsen og Hanus Lassen mynstra av sum skiparar umborð á Smyrli í summar**

PENSJÓN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*






*Pauli Larsen sigldi sín seinasta túr sum skipari umborð á Smyrli í dag, og í tí sambandi fekk hann eina skipsklokku frá manningini, sum Árni Mortensen hevði dreygað*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Eftir drúgva tænastu hjá Strandfaraskipum Landsins, leggja báðir skipararnir umborð á Smyrli nú árarnar inn.

Tað eru teir báðir, Pauli Larsen av Tvøroyri, ættaður úr Porkeri, og Hanus Lassen úr Klaksvík.

Pauli Larsen mynstraði av seinasta túrin, tá Smyril klokkan 11.30 í morgun kom aftur á Krambatanga. Hanus Lassen siglir sín seinasta túr á Syftunsøku, 2. juli. Eisini hann mynstrar av á Krambatanga klokkan 11.30 tann dagin.

Báðir hava havt drúgva tænastu umborð á bæði Smyrli og Teistanum, gomlu Mols-bátunum. Umframt eitt stutt tíðarskeið í 1980/81, tá Pauli var skipari umborð á Smyrli í uttanlandssigling, hevur hann verið fast umborð í 21 ár.

Hanus Lassen hevur enn drúgvaru tænastu hjá Strandferðsluni, heili 36 ár.

Samstundis hevur leiðslan á Strandferðsluni sett Erland Mørkøre í starv sum skipara umborð á Smyrli. Suðuroyarfjørður er tó ikki ókendur fyri Erlandi, tí hann siglur sum yvirstýrimaður og skipari umborð Smyrli og var áður við Teistanum og gamla Smyrli.

Hann byrjaði hjá Strandferðsluni 2. juni 1982 sum skipari við Ternuni um Leirvíksfjørð.

Eisini var hann í Trinidad við Teistanum í 1982/3. Hann byrjar í nýggja starvinum 9. juli í ár, upplýsir Strandferðslan.

# Flogfarið brotnaði í luftini

**Líkskoðanir vísa, at Air France-flogfarið brotnaði, áðrenn tað fór í havið. Serfrøðingar hava tí smáar vónir um at finna øll vrakpettini, og svørtu kassarnir eru ikki funnir enn**

FLOGVANLUKKA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*



*Ein franskur serfrøðingur tekur myndir av vrakpettum av Air France-flogfarinum*

- Vit eru um at vera lidnir við kanningarnar, sum eftir ætlanini skulu siga okkum, hví Airbus-flogfarið datt niður í Atlantshavið, sigur ovastin fyri franska kanningarbólkinum, Paul-Louis Arslanian, við blaðið Le Monde.

Teir báðir svørtu kassarnir, sum vóru í flogfarinum, høvdu helst svarað fleiri spurningum um, hvat veruliga hendi uppi yvir Atlantshavinum um náttina tann 1. juni, men hóast skip og kavbátar hava leitað við allari nútímans tøkni, eru kassarnir ikki funnir enn. Leitingin heldur fram, tí kassarnir eru gjørdir soleiðis, at teir senda tekin í 30 samdøgur aftan á eina vanlukku.

Tað vil siga, at kassarnir tagna um 10 dagar. Men leintingin eftir kassunum og sjálvum flogfarinum er trupul og ein avbjóðing í sjálvum sær, tí dýpið á vanlukkustaðnum er millum 1.000 og 4.600 metrar.

Air France-flogfarið datt niður í Atlantshavið á veg úr Rio de Janairo til París við 216 ferðafólkum umborð. Manningin taldi 12.

-Vit nærkast einum svari uppá, hví vanlukkan hendi, sigur Paul-Louis Arslanian við CNN.

### Sogin út

Franski kanningarleiðarin vil ikki koma við einum boði uppá, hvat hendi flogfarinum, men ein ónevndur brasilskur embætismaður segði í gjárkvøldið, at kanningar av teimum funnu líkunum benda á, at flogfarið brotnaði, áðrenn tað bar vioð vatnskorpuna.

Sambært embætismanninum vóru líkini næstan nakin, og tað bendir á, at flogfarið er brotnað í luftini, og at fólk eru sogin út úr tí. Amerikanski flogtrygdarse rfrøðingurin Jack Casey tekur undir við hesari frágreiðingini:

-Er flogfarið brotnað í 10 kilometra hædd, eru klæðini heilt einfalt skrødd av fólki, tá tey eru sogin út, sigur hann við CNN.

Líkskoðanir hjá brasilsku myndugleikunum hava víst, at eingin av teimum funnu druknaði, og tað hevur eisini styrkt illgrunan um, at flogfarið brotnaði, áðrenn tað bar við havið. Líkskoðanin hevur eisini staðfest, at talan var ikki um eina spreinging, og tað hevur fingið brasilsku og fronsku myndugleikarnar at útiloka, at talan var um yvirgang.

*Keldur: Aftenposten/DR*